## Úrslitið er batnað

**Postverk Føroya hevði minni í halli í fjør enn árið fyri. Inntøkurnar hjá stovninum eru at kalla tær somu sum fyrraárið**

POSTVERK FØROYA

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Postverk Føroya hevði aftur í fjør eitt hall á ársroknskapinum. Úrslitið fyri 2003 áðrenn avskrivingar var 0,7 mió. krónur í halli. Hetta er nakað minni enn árið fyri, tá Postverkið hevði 3,9 mió. krónur í halli.

Inntøkurnar hjá stovninum svaraðu til 109 mió krónur í 2003, og tað er umleið tað sama sum í 2002. Størsta inntøkuøkingin stavar frá sonevndum tíðindaleysum sendingum, sum góðu slakar tvær mió. krónur meir í inntøkum enn í 2002.

Størsta inntøkukeldan hjá Postverki Føroya er framvegis brøv. Av samlaðu inntøkunum á 109 mió. krónur, stava 37 mió. krónur frá brøvum. Inntøk-urnar av brøvum eru tær at kalla tær somu sum í 2002.

### Hægri lønir

Størstu útreiðslurnar hjá stovninum eru lønirnar. Lønirnar fara við góðum tveimum triðingum av samlaðu útreiðslunum hjá Postverki Føroya. Í 2003 rindaði Postverkið nærum hálvfjóðra millión krónur meir enn árið fyri, hóast ársverkini vóru færri.

Sambært ársfrágreiðingini vóru 240 ársverk á Postverki Føroya sammett við 245,5 í 2002.

# Marknaðarstjórin á Smyril Line gevst

**Sølu- og marknaðarstjórin á Smyril Line, Niels Kreutzmann gevst eftir bert fimm mánaðum í starvinum**

SØLUSTJÓRIN GEVST

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

38 ára gamli, Niels Kreutzmann, fer 31. juli úr starvinum sum sølu- og marknaðarstjóri á Smyril Line. Hann tók við starvinum á Smyril Line 1. mars í ár, og hann hevur sostatt bert sitið í starvinum í fimm mánaðir.

Tutlað hevur verið í krókunum um, at ein illstøða millum Niels Kreutzmann og leiðsluna á Smyril Line er orsøkin til, at 38 ára gamli danin hevur valt at stinga í sekkin bert fimm mánaðir eftir, at hann varð settur í starvið. Høvuðspersónurin sjálvur kveistrar hesar illgitingar til viks.

– Høvuðsorsøkin til, at eg gevist er, at eg havi fingið starv á Greenland Tourism í Danmark, og meira er ikki at siga um tað, sigur Niels Kreutzmann.

Á heimasíðuni hjá Smyril Line stendur skrivað, at Niels Kreutzmann hevur valt at fara úr starvinum av persónligum orsøkum. Vit royndu týsmorgunin at fáa eina viðmerking frá Jóannes á Vali, men tað eydnaðist ikki.

### Ferðavinnan

Niels Kreutzmann er útbúgvin cand. merc, og hevur drúgvar royndir innan ferðavinnu. Seinastu fimm mánaðirnir á Smyril Line hava fingið danan at ásanna, at ferðavinnan er hansara hjartamál.

– Tað hava verið fimm spennandi mánaðir á Smyril Line, men eg havi mett, at tað var rættast fyri meg at fara at arbeiða í ferðavinnuni aftur, tí tað dámar mær best, sigur Niels Kreutzmann.

Niels Kreuzmann er uppvaksin í Grønlandi, og hevur føroyska konu.




*Høvuðsorsøkin til, at eg gevist er, at eg havi fingið starv á Greenland Tourism í Danmark, og meira er ikki at siga um tað, sigur Niels Kreutzmann*

# – Vit eru fakfólk

**Tað eru Hentze Entreprenørar, sum standa fyri spreingiarbeiðinum á Eiði, har okkurt gekk galið mánadagin, tá steinar frá spreingingini endaðu niðri í bygdini**

SPREINGING

*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

– Mann dugdi ikki at forútsiga. Tað er eitt rættiliga sermerkt og hart grót á Eiði, og tá mann kemur aðrastaðni frá, so er mann ikki vanur við tað grótið. Og vit løddu tað fyrsta skotið heldur hart - men ikki harðari enn mann plagar, men harðari til tað grótið. Tað er øgiliga týdningarmikið, at mann býtur merkið í tað, tí tað fer umleið fýra ferðir minni lóður í grótið á Eiði enn aðrastaðni í Føroyum. Grótið á Eiði er so glashart, at tað tolir onki av, sigur Jákup Andrias Hentze frá Hentze Entreprenørum.

### Tríggir smásteinar

– Men vit skutu so aftur, og tá var í lagi. Men tað vóru ikki stórvegis skaðar. Eg haldi, at tað vóru einir tríggir smásteinar, sum komu á trý tøk. Og so var tað ein steinur, sum endaði á einum biltaki. Men tað vóru ikki alvorligir skaðar. Tað vóru smáskaðar, sigur Jákup Andrias Hentze.

### Ikki vanligan lúður

– Lúður varð brúktur, men vit brúktu kanska ikki tann vanliga lúðurin, sum mann plagar. Vit brúktu eitt lastbilahorn, sum er eitt nógv kraftigari ljóð. Tað stendur ikki fyriskrivað, hvat fyri slag av lúðrum, mann skal brúka. Tað stendur bert skrivað, at mann skal varskógva, sigur Jákup Andrias Hentze.

– Fólk hevur ofta hug at gera tað ógvusligari enn tað er. Nú var eg sjálvur har, og pápi mín var tann, sum sprongdi. Hann hevur sprongt alt sítt lív, og hann hevur ongantíð havt nakrar vanlukkur sum so. Aldrin í lívinum. Hetta er fyrstu ferð. Hann er 67 ár, sigur Jákup Andrias Hentze.

### Vit eru fakfólk

– Hatta er eitt hendiligt óhapp. Eg veit um onkrar, sum - nú skal eg ikki fara at hanga nakran út - men tað hava onkrir, sum ikki kenna til hatta grótið, verið og sprongt har fyrr. Og tað hevur verið nógv ógvusligari. Tað fekk eg at vita aftaná. Vit eru fakfólk, men tað kundi verðið nógv verri, um tað ikki vóru fakfólk. Men teir, sum hava gjørt skaðar har fyrr, eru eisini menn, sum hava sprongt í fleiri Harrans ár og hava dugað væl at sprongt. Teir vistu bara ikki av, at teir kundu koma út fyri slíkum. Tað er eitt sindur forkunnugt grót, sigur Jákup Andrias Hentze frá Hentze Entreprenørum.



*Sambært kunningarleiðaranum á danska Brúkararáðnum, Claus Brøgger, tykist tað etiskt ókorrekt at halda eini framleiðslu uttanfyri hálvalmenna Føroyahúsið, hóast hetta ikki er í stríð við nakra lóg*




*Eksklusivavtalur á danska ølmarknaðinum eru loyvdar, um ølbryggjaríið ikki hevur ein umsetning á størri enn 30% av samlaða ølmarknaðinum, og tí er samstarvið millum Føroya Bjór og Føroyahúsið ikki í stíð við lógina. Eftir stendur so moralski og mentanarligi spurningurin, um útisetar ikki skulu hava møguleikan at velja millum Føroya Bjór og Restorff´s í Keypmannahavn*

# Óetiskt bert at selja Føroya Bjór

**– Ølsølan í Føroyahúsinum er á ongan hátt í stríð við donsku lógina, og á alt ov nógvum sølustøðum í Danmark fæst á sama hátt bert Carlsberg. Harafturímóti tykist tað óetiskt at halda eini av tveimum føroyskum bryggjaríum uttanfyri ein hálvalmennan savningsmiðdepil, sigur kunningarstjórin á danska Brúkararáðnum, Claus Brøgger**

ØLSØLA

*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Aðalendamálið hjá danska Brúkararáðnum (Forbrugerrådet) er at verja og arbeiða fyri rættindunum hjá brúkaranum. Í Føroyum hava vit ikki á sama hátt eitt brúkararáð við politiskum og løgfrøðiligum heimildum, hóast privat brúkarasamtak við somu endamálum fyri stuttum varð stovnað í Føroyum.

### Skerd kapping

Claus Brøgger, kunningarstjóri á danska Brúkararáðnum, sigur, at einki í donsku lóggávuni forbjóðar Føroyahúsinum bert at selja frá einum av tveimum føroyskum bryggjaríum. Men hóast lógin ikki forbjóðar føroyska framferðarháttinum í Keypmannahavn, finst Brøgger at støðuni.

– Á alt ov nógvum donskum barrum kann brúkarin bert keypa Carlsberg, og eg meti tað tykjast etiskt ókorrekt at halda eini framleiðslu uttanfyri hálvalmenna Føroyahúsið, líkamikið um tað er lógligt ella ikki, sigur Claus Brøgger.

Hann heldur, at danska kappingarlógin skuldi verið strangari, tá effektiv og javnbjóðis kapping verður forðað, sum talan sambært honum er um í hesum sambandi.

Líkamikið, hvørji sjónarmiðini eru um avgerðina hjá leiðsluni í Føroyahúsinum bert at selja Føroya Bjór, og um tað er rætt, at leiðari hússins Martin Fjallstein er privatur umboðsmaður hjá stóru ølfyritøkuni í Føroyum, kann sambært bæði danska Kappingar- og Brúkararáðnum staðfestast, at eingin lóg verður brotin.

# Fjallstein brýtur onga lóg

**- Leiðarin í Føroyahúsinum ger sum allir aðrir restauratørar í Danmark, og eksklusivavtalur eru ikki í stríð við donsku kappingarlógina, um bryggjaríið hevur minni enn 30% á marknaðinum. Eftir stendur so mentanarligi og moralski spurningurin, sigur Vagn Rasmussen á danska Kappingarráðnum í sambandi við stríðið um ølsøluna í Føroyahúsinum**

ØLSØLA

*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

– Vit hava ikki heimildir at taka støðu til møguliga dupulta leiklutin hjá leiðaranum í Føroyahúsinum. Tað eru eigararnir av húsinum, sum gera slíkt av, tí hetta er ikki í stríð við kappingarlógina, sigur Vagn Rasmussen á danska Kappingarráðnum.

### Eksklusivavtalur loyvdar

1. juli kastaði Sosialurin ljós á ónøgdina hjá Johan Mortensen, stjóra á Restorff´s Bryggarii. Johan fýltist at stjóranum í Føroyahúsinum í Keypmannahavn, Martin Fjallstein, tí hann ikki selur Restorff´s øl til útisetar okkara í Keypmannahavn. Sambært Johan er orsøkin, at Martin Fjallstein er privatur umboðsmaður hjá Føroya Bjór, og misnýtir hann tí sambært Johan hálvalmenna sjálvognarstovnin til egnan vinning.

Men sambært Vagn Rasmussen á danska Kappingarráðnum agerar Fjallstein eins og allir aðrir restauratørar í Danmark. Danska kappingarlógin sigur, at um eitt ølbryggjarí ikki hevur ein umsetning á meiri enn 30% av danska ølmarknaðinum, eru eksklusivavtalur loyvdar. Tað vil siga, at bert stóra Carlsberg er undirlagt lógina um forboð móti eksklusivavtalum og skal hava sínar avtalur góðtiknar av Kappingarráðnum. Umframt hetta fellur sambandið millum Føroyahúsið og Føroya Bjór undir "bagatelbestemmelserne" í donsku kappingarlógini, sum áseta reglur fyri vinnurekandi, sum hava undir 10% av ølmarknaðinum.

– Tað einasta, Føroya Bjór og Føroyahúsið sambært lógini ikki kunnu avtala sínamillum, er kostnaðurin, Føroyahúsið tekur fyri ølið, sigur Vagn Rasmussen á danska Kappingarráðnum.

### Moralur og mentan

Vagn Rasmussen slær sostatt fast, at Martin Fjallstein ikki fer útum lógarinnar karmar, hóast hann er privatur umboðsmaður hjá Føroya Bjór og samstundis leiðari á einum sjálvognarstovni, sum er á føroysku fíggjarlógini. Men sambært Vagn Rasmussen er hetta ikki endin á søguni um ónøgdina hjá Johan Mortensen. Hann heldur nevniliga, at hóast talan ikki er um lógarbrot, er problematikkurin avgjørt verdur at viðgera.

– Hóast talan ikki er um ein løgfrøðiligan trupulleika, hava vit við ein bæði moralskan og mentanarligan spurning at gera. Spurningurin er, um føroyingar í Keypmannahavn ikki skulu hava møguleikan til bæði Føroya Bjór og Restorff´s øl, sigur Vagn Rasmussen. Hann slær fast, at hetta er ein spurningur, sum Kappingarráðið sum sagt ikki hevur heimildir at gera av.